

men tíverri ikki til at avoyða hana.

- Hinvegin so er hon komin á eitt slíkt lágt støði, at sjálvt fuglurin kann liva her. Tað skuldi verið besta tekin um, at vit eru á góðari leið, sigur Kári á Presttrøðni.

### Vekt í eygsjón

Veðrið er av tí besta, og menn setast at rinda møðina eina løtu. Ikki ov leingi, tí teir vilja sleppa aftur at landi, áðrenn tað verður ovseint.

Hinvegin eru líkindini soleiðis, at siglt verður longur vestur – til avtoftaðu bygdina í Víkum. Menn eru staðkendir og kunnu navngeva bæði skorar, gjáir og drangar framvið landi.

Tað er týðiligt og greitt, at hetta er nakað sum teir eldru og teir ungu menninir ganga høgt uppí, bæði at varðveita ein part av mentan okkara at sleppa veðrar í urðina, og at geva førningin víðari til eftirkomarar teirra.

Nú eru veðrarnir so sleptir í urðina, Oyrargjógv er í eygsjón og kalt er í veðrinum. Menn kunnu nú gleða seg til at fara eftir teimum aftur í heyst – einaferð eftir hálvan september.

Spennandi verður tá at vita, hvussu væl fyri veðrarnir eru tá. Vónandi koma teir allir afturíaftur – men ikki minst: Hvat verður vektin á mínum veðri.

Livst, so spyrst!

*Trygdin er altíð í hásæti, tá miðvingar fara norður í urðina. Einaferð kom brádliga illveður á teir, og tá var neyðugt at flyta menninar úr urðini við tyrlu - av staðnum, har Kári á Presttrøðni her stendur*



③



④

*1) Tann reyða jollan er flutningsakfarið, tá menn skulu stjórast millum urð og land. Her koma teir seinastu umborð á bátin. Nú er klárt at sigla heim*

*2) 73 ára gamli Eyðun Samuelsen eigur mong sporini í urðini. Stuttligt var at hoyra hann siga frá, hvussu teir bóru seg at í gomlum døgum*

*3) Veðrar og fólk eru komin í land. Nú er at fáa teir úr grótinum og úr urðini, har tað góða grasið er. Spennandi verður at síggja, hvussu vektin verður í heyst*

*4) Ferðin er at enda komin. Kósin er sett ímóti Oyrargjógv. Í heyst verður sama túrur gjørdur aftur*